## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Próvtøkur á Føroya Sjómansskúla

**Mikudagin 21. desember 2005 fingu maskinmeistarar, skipsførarar og skiparar prógv á Føroya Sjómansskúla**



*Skipsførarar: Knút Brandal, Sigvald Zachariasen, Hans Kári Jacobsen, Regin Brattaberg, Rói Norðoy, Jógvan Hvidbro, Sigvald Kristiansen, Gundur Gaardbo, Napoleon Vestergaard og Jógvan Hansen*
*Mynd: Lasse Borðoy*



*Maskinmeistarar: Suni E. Justinussen, Fróði Mortensen, Poul Nolsøe Sørensen, Poul Henning Jacobsen, Tummas Pauli Juul og William Olsen*
*Mynd: Lasse Borðoy*



*Skiparar: Jákup Ljósstein, Niklas Restorff Jacobsen, Janus Joensen og Ólavur Højgaard. Brandur í Funningsstovu væntar á myndini*
*Mynd: Lasse Borðoy*

**Brúdleyp**
Onsdagin 28. desember kl. 14.00 giftast í Sandvíkar kirkja, Anna Svandis Sigurðardóttir, úr Hovi og Pauli Danielsen, úr Sandvík. Vælkomst verður í heiminum hjá Sólrun og Fríðálv í Sandvík, frá kl. 15.00-18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Fríggjadagin 30. desember kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Harriet Midjord Petersen, Fuglafjørður og Rói Sjúrðarson Kalsø, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum á Sjómans-skúlanum, Tórshavn, kl. 19.30.

Leyga-rdagin 7. januar kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Martha Simonsen og Eyðfinn Sigurstein, Tórshavn. Væl-komst verð--ur í Pálsstovu kl. 19.00. tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá innan 25. des. á tlf. 313830, Martha 216680, Eyðfinn 216600 ella mail-- á esg@post.olivant.fo

Tann 8. januar kl. 12.30 giftast í Kastrup Kirkju við Vording-borg, Heidi Sonja Danielsen, dóttur Dinnu Nónfjall og Jógvan Elis Danielsen, og Arne Nielsen, Tappernøje, Danmark. Brúdleypsadr.: Abbednæs Kro, Appenæs bygade 101, 4700 Næstved.

Leygardagin 28. januar kl. 16.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Sólrun Mortensen, Argir og Jan Arabo, Kollafjørður. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá innan 15. januar á tlf. 314773, 421180, 229101, 777012. Á mail: somo@post.olivant.fo. ella arabo@post.olivant.fo

Leygardagin 4. februar kl. 14.00 giftast í samkomuni Immanuel, Brekkutún 3, Hoyvík, Jóna Pállsdóttir Midjord, Argir og Pætur Dam Jacobsen, Havn. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá í tlf. 514175 ella 258801 áðrenn 9. januar.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. januar hava Bergur og Mary-Jana á Reyna-trøð, Runavík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygd-ar-húsinum í Leirvík leygardagin 28. januar kl. 18.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 15. januar á tlf. 448128, helst eftir kl. 18.00.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 30. desember hava hjúnini Sonja og John Mikkelsen, Ànirnar, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum í Danmark á Veksøbugt Feriesenter, Veksøvej 300, 7730 Hanstholm.

**50 ár**
Týsdagin 27. desember fylla Eyðun Hansen og Marita Olsen, Norðragøta, 50 ár. Dagurin verður hildin í Gøtubrá frá kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

**60 ár**
Fríggjadagin 23. desember verður Tollakur Djurhuus, Havn, 60 ár. Opið hús verður í Sjónleikarhúsinum frá kl. 19.00. Øll eru vælkomin.